Bilar

Nr. 65 • hósdagur • 7. apríl 2005 • 79. árg.



*Saab 9-3 Sport Sedan innan. 1,9 TiD dieselmotorarnir larma lítið inni í kabinuni*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Saab 9-3 Sport Sedan:

# Kvikir og økonomiskir dieselmotorar

**Saab 9-3 Sport Sedan er ein Saab í breiðastu merking, bæði hvat trygd, útgerð og komforti viðvíkur. Umframt fýra bensinmotorar fæst Saab 9-3 eisini við tveimum kvikum 1,9 litur dieselmotorum við ávikavist 120 og 150 hk**



*Saab 9-3 Sport Sedan fæst við tveimum kvikum 1,9 litur dieselmotorum við ávikavist 120 og 150 hk*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Liðin eru meira enn 25 ár, síðan Saab byrjaðu við sínum turbo bensinmotorum, sum teir eru so kendir fyri. Men turbodiesel motorarnir standa einki aftanfyri.

Tað eru nú nøkur ár síðan Saab komu á marknaðin við sínum fyrstu dieselmotorum, og var tað ivaleyst ein røtt avgerð at taka. Motorarnir roynast væl, eru kvikir, larma lítið og eru lutfalsliga økonomiskir.

Saab 9-3 Sport Sedan fæst við tveimum 1,9 litur dieselmotorum við ávikavist 120 og 150 hk. Um vit samanlíkna báðar 1,9 litur TiD dieselmotorarnar, vísir tað seg, at tann størri er bert 2 sek. kvikari,, og oljunýtslan er næstan tann sama. Talan er um tveir sera kvikar dieselmotor, ið larma lítið inni í kabinuni og eru næstan sum bensinmotorar at koyra við. Saab 9-3 Sport Sedan fæst annars við fýra ymiskum 4 syl. besinmotorum frá 122 til 210 hk.

Bæði hvat aktivu og passivu trygdini livir 9-3 Sport Sedan upp til tað, ið vit kunnu vænta av einum Saab. Umframt ABS bremsuskipan og elektroniska deiling av bremsukraftini (EBD) hevur bilurin eisini Traction Control System (TCS), elektroniskan stabilisator (ESP), mekaniskan bremsuassistent (MBA) og (CBC) ið ger at til ber at bremsa og stýra samstundis, uttan at bilurin glíður út til síðuna.

Nógvar ymiskar trygdarskipanir, ið eru innbygdar í bilin, verja bilføraran og tey ferðandi sum t.d. Saab Aktive Head Restraint (SAHR) nakkapúturnar sum verja væl móti skaða á hálsin og nakkan.

Bilurin vit royndarkoyrdu var ein væl útgjørdur 1,9 TiD (120 hk) við leðursetrum, acc-klimakontroll og E-pakkanum við leðurratti, radio v. fløguspælara, ið kann stillast á rattinum, ferðpiloti, tokulyktum og 16" alu-felgum. Hesin bilurin kostaði kr. 362.400,-



*Bilurin vit royndarkoyrdu var ein 1,9 TiD við 120 hk*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Saab 9-3 Sport Sedan 1,9 TiD

| | |
|---|---|
| Motorurin: | 1,9 litur 4 syl. TiD við 120 hk |
| 0-100 km/t: | 11,5 sek |
| Oljunýtsla: | 17,2 km/l |
| Dekkstødd: | 215/55 -16 |
| Stødd og vekt | |
| Longd: | 463,5 cm |
| Breidd: | 176,2 cm |
| Hædd: | 146,6 cm |
| Eginvekt: | 1425 kg |
| Viðførisrúm: | 425 litrar |
| Prísur: | kr. 323.000,- (standardútgávan) |
| Søluumboð | P/F Meinhardt Arge<br>v. Oyggjarvegin<br>FO-110 Tórshavn<br>Tel. 345400<br>www.bilarge.fo |

## Toyota heimsins størsti



Fleiri amerikansk analysubureau eru samd um, at Toyota verður heimsins størsti bilframleiðari skjótari enn væntað. Konsernin arbeiðir miðvíst fram móti hesum máli, verður sagt

*Kelda: Motor Magasinet*

## VW framleiðsla í Malaysia



Eftir samráðingar í longri tíð er endaliga støða tikin til, at Volkswagen skulu framleiða bilar í Malaysia í samstarvi við Proton-bilverksmiðjuna har. Proton byrjaði upprunaliga sum samstarv millum malaysisku stjórnina og Mitsubishi

*Kelda: Motor Magasinet*

## Audi framleiðsla í USA



Leiðslan hjá týsku Audi bilverksmiðjuni arbeiðir við veruligum ætlanum um at framleiða bilar í USA til amerikanska marknaðin. Orsøkin er lági dollarin, váttar Audistjórin Martin Winterkorn

*Kelda: Motor Magasinet*